Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 • Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og regn ella sirm av og á, men týsdagin klárari. Hitin millum 8 og 12 stig.

# - Skøkjurnar ganga fremst inn í himmalin



*Komandi hóskvøld framførir íslendski sjónleikarabólkurin »Norðanljós« leikin »Skøkjan Rósa«*

Í vár bjóðaði Norðurlandahúsið íslendska sjónleikarabólkinum "Norðanljós", at koma til Føroyar við leikinum "Skøkjan Rósa - skøkjurnar ganga fremst inn í himmalin". José Luis Martín Descalzo, sum er spaniumaður, hevur skrivað leikin.

-"Skøkjan Rósa" verður spældur hóskvøldið 20. juli 2000 kl. 19.30 í Norðurlandahúsinum.

Skøkjan Rósa er einmansleikur. Rósa er skøkja, sum býr uppi á loftinum á einum gomlum húsi, sum einaferð var skøkjuhús. Rósa hevur í íbúðini eina standmynd af Jesusi, og tosar hon alla tíðina við myndina um lív sítt, dreymar, sorgir og mannin, hon elskaði — ella enn elskar. Henni dámar ikki prestarnar ella nunnurnar og er ikki bangin at siga, hvat ið hon heldur um tey.

José Luis Martín Descalzo las til prest, tá ið hann var yngri, og var somuleiðis blaðstjóri í mong ár á einum av teimum størstu dagbløðunum í Madrid. Hann skrivaði nógv og var væl kendur í heimlandinum. José L.M. Descalzo hevur sagt soleiðis um skøkjuna Rósu: "Hetta er ein sonn søga, og tá ið fekk hana fortalda, rørdi hetta við kenslur mínar, og hugsaði eg um sjálvt lívið, og hvat lívið hevur at bjóða hvørjum einstøkum".

Leikarari í Skøkuni Rósa er Saga Jónsdóttir. Saga hevur arbeitt sum sjónleikari á Akureyri, á Tjóðarsjónleikarahúsinum og á øðrum sjónleikarahúsum í Íslandi í mong ár. Hon hevur eisini arbeitt sum stjóri á sjónleikarahúsi og hevur havt leiklutir í sjónvarpi, verið við at spælt film og hevur havt uppgávur fyri útvarp.

Saga var t.d. við í filminum Dansurinn, sum var upptikin í Føroyum. Hon setti eisini upp leikin Seggj, sum Haukur Símunarson hevur skrivað, fyri Klaksvíkar Sjónleikarafelag í 1998.

Hesi hava verið við at gjørt og sett leikin upp:

- Edward Fuglø, scenografi

Ingvar Björnsson, ljósmaður. Er til dagliga í føstum starvi á sjónleikarahúsi á Akureyri.

Kristian Edelstein, ljóðmaður. Er somuleiðis í føstum starvi á sjónleikarahúsi á Akureyri.

Henda framførsla er eisini eitt samstarv millum Sjónleikarabólkin Norðanljós og Leikfélag Akureyrar.




Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer í landsynning




Hátrýstið yvir Íslandi fer um Føroyar í vikuskiftinum við góðveðri.




**Hitalagið mált frá 12./07. kl 06⁰⁰–13./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,5°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 12./07. kl 6⁰⁰–13./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: 19,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannahavn | 20 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 23 |
| Malorca | – |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 36 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | – |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 6 |

## Vestfalskyrrindi

8. juli: Fyrra kvarter
15. juli: Mánin longst frá jørðini
16. juli: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 5.47 | 18.08 | 4.47 | 17.08 | 5.02 | 17.23 | 7.47 | 20.08 | 8.47 | 21.08 | 4.02 | 16.23 | 3.02 | 15.23 | 6.02 | 18.23 | 7.02 | 19.23 | 5.32 | 17.53 | 6.47 | 19.08 |
| 15. juli | 6.29 | 18.49 | 5.29 | 17.49 | 5.44 | 18.04 | 8.29 | 20.49 | 9.29 | 21.49 | 4.44 | 17.04 | 3.44 | 16.04 | 6.44 | 19.04 | 7.44 | 20.04 | 6.14 | 18.34 | 7.29 | 19.49 |
| 16. juli | 7.08 | 19.27 | 6.08 | 18.27 | 6.23 | 18.42 | 9.08 | 21.27 | 10.08 | 22.27 | 5.23 | 17.42 | 4.23 | 16.42 | 7.23 | 19.42 | 8.23 | 20.42 | 6.53 | 19.12 | 8.08 | 20.27 |
| 17. juli | 7.46 | 20.05 | 6.46 | 19.05 | 7.01 | 19.20 | 9.46 | 22.05 | 10.46 | 23.05 | 6.01 | 18.20 | 5.01 | 17.20 | 8.01 | 20.20 | 9.01 | 21.20 | 7.31 | 19.50 | 8.46 | 21.05 |

Kelda: Skipalistin 2000

**Føroya største úrval av**
**PAKKITILFARI**
**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:

* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*